**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 17. desember 2017 kl. 17.00**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Ingi Olsen, Eyðun Hansen, John Zachariassen, Laila Haldansen, Herit Magnussen og Durita á Heygum
**Skrivari:** Maud Poulsen

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 48**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um at broyta ársroknskapin fyri Vestmanna Kommunu fyri 2016.
J.nr. 00.32.00-1-17

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 13. desember 2017 málið um at broyta ársroknskapin fyri Vestmanna Kommunu fyri 2016.

Nevndin mælir til at broyta roknskapin fyri Vestmanna Kommunu fyri 2016 vísandi til krav frá Heimatænastuni í VEKS á kr. 1.324.142,87, sum Vestmanna Kommuna er skuldskrivað fyri í roknskapinum hjá Heimatænastuni í VEKS fyri 2016.

**Viðv. 48**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 49**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um 2. viðgerð av endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2017.
J.nr. 00.30.10-1-16

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 13. desember 2017 uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2017.

Nevndin samtykti at leggja uppskotið til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2017 fyri bygdarráðið til 2. viðgerð og mælir til, at uppskotið verður samtykt.

**Viðv. 49**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 50**
Áseting av almennu fundardøgunum hjá Vestmanna Bygdarráði í 2018
J.nr. 00.22.02-G01-1-16

Tilmæli frá Paula T. Petersen, borgarstjóra, um at áseta almennu fundardagarnar hjá Vestmanna Bygdarráði fyri 2018 til hesar:

30. januar
27. februar
20. mars
17. apríl
29. mai
19. juni
28. august
25. september
23. oktober
27. november
11. desember

**Viðv. 50**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 51**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um stuðul frá John Dam um stuðul til tónleikatiltak.
J.nr. 20.00.00-3-17

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 13. desember 2017 umsókn frá tær um stuðul til eitt tónleikatiltak, sum ætlanin er at hava á Bryggjuni í februar. Søkt verður um kr. 10.000 í stuðli.

Nevndin samtykti at leggja málið fyri bygdarráðið til støðutakan treytað av at neyvari frágreiðing kemur áðrenn fundin.

**Viðv. 51**
Pauli T. Petersen, borgarstjóri, skeyt upp at samtykkja at útseta støðutakanina til, aftaná at fundur hevur verið millum John Dam og umboð fyri bygdarráðið fyrst í komandi ári.

**Mál 52**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um brúnna millum skúlarnar.
J.nr. 20.00.00-3-17

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 13. desember 2017 fráboðan frá leiðandi húsavørðinum um, at brúgvin millum skúlarnar nú er í so vánaligum standi, at teir mæltu til, at brúgvin verður skift út.

Nevndin mælir til at samtykkja, at ein nýggj brúgv verður gjørd millum skúlarnar, og at kostnaðurin verður játtaður á endurskoðaðu fíggjarætlanini fyri Vestmanna Kommunu fyri 2018.

**Viðv. 52**
Tilmælið var einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.00

Sign.:

Pauli T. Petersen Ingi Olsen Eyðun Hansen

John Zachariassen Laila Haldansen Herit Magnussen Durita á Heygum